FØROYA HANDILSSKÚLI



Føroya Handilsskúli søkir eftir

## Lærara at undirvísa í logistikki á akademiútbúgvingini

**Um akademiútbúgvingina logistikkbreytin:**
Akademiútbúgvingin (AÚ) verður boðin sum parttíðarlestur. Útbúgvingin hevur seks modul, ið eru býtt sundur í fýra fakmodul (lærugreinar) og tvær størri verkætlanir.

Í útbúgvingini eru ymsar merkantilar breytir, og sum nakað nýtt er ætlanin at bjóða logistikkbreyt eftir summarfrítíðina.

**AÚ í logistikki fevnir um:**
1) trý kravd fakmodul:
- logistikk
- flutning, distributión og flutningsjura
- altjóða flutning og logistikk

2) eitt valfrítt fakmodul
3) tvær størri verkætlanir:
- sergrein
- endaliga verkætlan

**Um starvið**
Talan er um parttíðarstarv, og vanliga verður undirvíst seinnapart ella um kvøldið. Hvørt fakmodul er 60 undirvísingartímar, býttir út á eina lestrarhálvu. Undirvísing og vegleiðing kunnu í ávísan mun lagast til tíni persónligu ynski.

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísing í fakmodulunum logistikki og altjóða flutningi og logistikki
- vegleiðing í størri verkætlanum í útbúgvingini

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa í AÚ í logistikki
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta

Undirvísingarroyndir eru ein fyrimunur, men ikki krav.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett 1. september 2008 og verður lønt smb. takstum fyri hægri útbúgvingar á Føroya Handilsskúla.

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til Føroya Handilsskúla, Postsmoga 177, FO110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2008.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen, á tel 317177 ella á **alk@hsh.fo.**

*Á Føroya Handilsskúla ganga um 400 næmingar, 200 á hægri handilsskúla (HH) og 200 á fyrisiting, handli og skrivstovu (FHS). Undirvíst verður í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 lærarar, á Kambsdali um 20. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, t.d. teldustøðingi, HD og akademiútbúgving. Akademiútbúgvingin er skipað sum parttíðarlestur.*

FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 317177
Telefax 313374

**Heimasíða skúlans:**
**www.fh.fo**

Runavíkar Kommuna
søkir eftir

## Starvsfólki til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
- 3 pedagogum 30t/35t um vikuna, til vøggurstovunar
- 3 pedagogum 30t/35t um vikuna, til barnagarðstovurnar

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Størvini verða sett 11. august 2008 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juni 2008, kl. 12.00.

***Runavíkar Kommuna***
***Heiðavegur 26***
***Postrúm 139***
***FO-610 Saltangará***

Í Barnagarðinum á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/ rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

***BILIMPORT**.fo*







## NISSAN TITAN TIL SØLU

NISSAN
Árgangur: **2006**
Km: **35.800**
Motorur: **5,6 cc - V8 - 305 hk**

**VÆL HILDIN**

Kostnaður kr.
**220.000,-**

Áhugaði ringi:
**213636**



3½ ÁRA GAMALT YAMAHA KLAVER
MOD. P112N, KIRSUBERTRÆ, TIL SØLU.
NÝPRÍSUR KR. 46.600,- **NÚ KR. 32.000,-**
TLF. 216087 · SIMME@SIMME.EU

simme musikkhús

N. Finsensg. 7 · Tórshavn · tlf 311687



# Motorsúkkla

Suzuki SV1000, maj 2007, 1400 km,
sera væl hildin, til sølu fyri kr. 90.000.

**Ring ella send SMS til 541235**